FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, tann 7. juli 2010

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. xx/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirlønargrunn

## § 1

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 25. mai 2009, verður hesar broytingar gjørdar:

1) Í §2, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis:

   Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin frá 1. januar 2011 at rokna: 2%.

2) Í § 2, stk. 2 verður 4. pkt. orðað soleiðis:

   Ásetti prosentparturin er frá 1. januar 2011 at rokna: 2 %.

3) Í §§ 8 og 9 verður “Toll- og Skattstova Føroya” broytt til: “TAKS”.

## § 2

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

**Innleiðing:**
Uppskotið er ein partur av uppskotinum til semju, sum er gjørd millum allar teir politisku flokkarnar um eina pensjónsnýskipan.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar til broytingarnar í fólkapensjónini soleiðis, sum tað er greitt frá í uppskotinum hjá Almannamálaráðnum í løgtingsmáli xx/2010 Uppskot til løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Eisini skal uppskotið síggjast í samband við hesir lógaruppskot:

- Uppskot til løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
- Uppskot til løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl.
- Uppskot til "lovbekendtgørelse om offentlig forsorg"
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Víst verður eisini til útrokningar og viðmerkingar í frágreiðingini "Pensjónsnýskipan 2009 – Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar", sum er hjálagt sum skjøl til Løgtingsmál nr. XX/2010 *"Uppskot til løgtingslóg um XX"*.

**Endamál við uppskotinum.**
Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Ein av broytingunum í pensjónsnýskipanini er at fólkapensjónsupphæddirnar verða bruttofiseraðar. Í hesum høpi merkir bruttofisering, at fólkapensjónsupphæddirnar verða gjørdar skattskyldugar. Um bert hetta varð gjørt, so hevði inntøkan eftir skatt hjá pensjónistum minkað nógv. Tað er tí neyðugt, at fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar munandi.

Fólkapensjónsupphæddirnar verða hækkaðar munandi, men skatturin hjá pensjónistum hækkar við somu upphædd, so um einki annað verður gjørt, so fáa pensjónistar, sum onga aðra inntøku hava enn fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirløn, eina óbroytta inntøku eftir nýskipanina.

Útrokningar vísa, at pensjónistar, sum hava egininntøku úr umleið 60.000 og upp til 120.000 fáa munandi hægri tøka inntøku eftir skatt, tá nýskipanin er framd.

Hinvegin førir nýskipanin í sær sjálvum ikki til stórvegis broyting hjá pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Politiski fylgibólkurin hevur ynskt, at tøka inntøkan hjá pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum eisini skal vaksa, nú pensjónsnýskipanin verður framd.

Politiski fylgibólkurin er tí vorðin samdur um at hækka inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin úr 1,75 % og upp í 2 prosent.

**Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum.**
Mett verður, at hetta fer at føra til, at útgjaldið kann hækkast úr 2.600 kr. um mánaðin (31.200 kr. um árið) og upp í umleið 3.000 kr. um mánaðin (36.000 um árið).

Hækkingin av útgjaldinum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum førir til, at tøka inntøkan hækkar um 2.000 kr. árliga hjá teimum pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis fíggjarligar og umsitingligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið hevur sosialar avleiðingar, tí mett verður, at uppskotið fer at føra til, at útgjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fer at hækka úr 2.600 kr. um mánaðin (31.200 kr. um árið) og upp í umleið 3.000 kr. um mánaðin (36.000 um árið).

Hækkingin av útgjaldinum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum førir til, at tøka inntøkan hækkar um 2.000 kr. árliga hjá teimum pensjónistum, sum bert hava inntøku frá fólkapensjón og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið ella í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serliga viðmerkingar**

**Til § 1**

Nr. 1.
Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Nr. 2.
Við uppskotinum verður inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (vanliga nevndur Samhaldsfasti) hækkað úr 1,75 prosentum upp í 2 prosent.

Nr. 3.
Við uppskotinum verður heitið Toll- og Skattstova Føroya broytt til TAKS. Talan er um eina dagføring.

**Til § 2**

Áseting um ígildiskomu.

Á Løgtingi, 7. juli 2010

**Annita á Fríðriksmørk**
løgtingskvinna

**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**
løgtingskvinna

**Bjørn Kalsø**
løgtingsmaður

**Hans Pauli Srøm**
løgtingsmaður

**Helgi Abrahamsen**
løgtingsmaður

**Jákup Mikkelsen**
løgtingsmaður

**John Johannessen**
løgtingsmaður

**Karsten Hansen**
løgtingsmaður

**Kári P. Højgaard**
løgtingsmaður

**Óli Breckmann**
løgtingsmaður